

Eldar Sætre leggur fram Johan Sverdrup-ætlanina. Mynd: Ole Jørgen Bratland/Statoil

# Statoil á odda fyri íløgu fyri 100 milliardir krónur

**Jógvan Hugo Gardar**

13.02.2015 - 09:50

Oljan.fo

Staoil hevur í morgun, hevur saman við samstarvsfeløgunum, latið norska oljumálaráðharranum, Tord Lien,íløguætlanina fyri Johan Sverdrup-fundið í Norðsjónum.

- Hetta er ein stórur dagur hjá okkum. Vit lata í dag frá okkum ætlanina fyri útbygging av størsta oljufundinum á norska landgrunninum síðani 80'ini. Johan Sverdrup-leiðin kemur at geva stórar inntøkur til norska samfelagið í nógv tíggjuár framyvir. Sjálvt við tí lága oljuprísnum sum vit hava havt kemur hetta øki at geva yvirskot, segði Eldar Sætre tá hann lat ráðharranum ætlanina.

Talan er um stórar upphæddir í hesi ætlanini. Tað sum talan er um í fyrstu atløgu er fyrsti partur, ið einsamallur kemur at kosta meir enn 100 millirdir krónur at byggja út, og mett verður at hendan leiðin kemur at geva millum 1,4 og 2,4 milliardir oljulíkar.

Oljulíkar er tann eindin, sum verður brúkt har olja og gass er umroknað til sama virði.

Fyri alla Johan Sverdrup-ætlanina metir Statoil at kostnaðurin kemur at vera millum 145 og 170 milliardir krónur, og roknast kann við at framleiðast kunnu millum 1,7 og 3 milliardir oljulíkar.

Johan Sverdrup skal byggjast út í fleiri umførum. Fyrsti partur eru fýra boripallar sum skulu byggjast saman við gongubrýr millum sín. Framleiðast skulu millum 315.000 og 380.000 føt av olju um dagin, og framleiðslan byrjar seint í 2019.

Statoil er fyristøðufelag, og eigur um 40 prosent av loyvinum. Hini feløgini eru Lundin Norway við góðum 22 prosentum, Petoro við knøppum 18 prosentum, DNO við knøppum 12 prosentum og Maersk Oil við góðum átta prosentum. Tað eru norskir myndugleikar sum avgera endaliga býti av loyvinum millum hesi feløgini.





